## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av suðri, seinnapartin upp í andøvsgul. Stundum sirm ella mjørki, men eisini sólglottar. Hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og sirm av og á, men eisini sólglottar. Hitin millum 17 og 20 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin andøvsgul av útsynningi og ælaveður, sunnudagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 10 og 14 stig.

## DAGSINS FERÐAFÓLK

# Henrik Høgstrup, Lolland, Danmark

**Klokkan fimm í morgun legði Nørrøna at, og millum mongu ferðafólkini var Henrik Høgstrup, konan og børnini, verforeldrini og tvey systkinabørn at børnum hansara.**

*Orð og mynd: Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



**Hví ert tú í Føroyum?**
Eg eri sølu- og marknaðastjóri í Lalandia, og har hava vit eitt gott samstarv við Smyril Line og Atlantic Airways. Har havi eg fingið nøkur góð sambond, og tá hugurin til at ferðast hendavegin altíð hevur verið til staðar, so var upplagt at ferðast hertil og til Íslands í summar.

**Hvat fara tit at gera í dag?**
Nú fara vit víðari longu mikudagin, so vit hava úr at gera við at uppliva oyggjarnar áðrenn vit fara. Vit komu til Føroyar klokkan fimm í morgun, og longu klokkan átta fóru vit fyrsta túrin. Vit fóru ein túr til Klaksvíkar við tyrluni, har vit vóru ein tíma, og so flugu vit aftur til Havnar. Børnini og verforeldrini hava ongantíð verið í tyrlu áður, og tað var ein stór uppliving at síggja oyggjarnar frá í erva í morgun.
Í kvøld ætla vit okkum niðan á Hotel Føroyar, har vit skulu royna føroysku buffetina.

**Er tað annað tit skulu royna meðan tit eru her?**
Ja, í morgin fara vit til sjós. Fyrst skulu vit ein slupptúr við Jóhonnu undir Hestoynna, har vit fara at hoyra tónleik. Og seinni skulu vit ein annan túr við somu slupp at fiska. Hetta gleða børnini seg til, og vónandi fáa vit fiska okkum okkurt til náttúrða.
Mikudagin er onki á skránni, men vit hava onkrar ætlanir um at vitja út í Kirkjubø, áðrenn vit fara víðari til Íslands.

**Hvat dámar tær Føroyar higartil?**
Eg hevði sett mær mína egnu mynd saman í høvdinum, út frá teimum sendingum vit síggja niðri, tá drotningin vitjar her, okkurt tílíkt, og tann myndin passaði fullkomiliga. Stóru og vøkru fjøllini og smáu og hugnaligu húsini. Tað passaði so mikið væl, at tað næstan kendist sum um, at eg hevði verið her fyrr.

**Tit fara víðari mikudagin tá semifinalan millum Frakland og Portugal er, ætlar tú at hyggja?**
Eg vil siga, at áhugin fyri HM hevur ikki verið tann sami, nú Danmark ikki er við. Vit royndu at halda við Svøríki, men tað gekk heldur ikki so væl hjá teimum, so tað er synd at siga, at eg havi fylgt væl við. Men nú er tað semifinalurnar sum snýr seg um, so kanska eg fari at seta meg at hyggja umborð.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 13 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 29 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 21 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 24 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 29 |
| Madrid | 30 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | -- |
| Malta | 29 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 15 |
| New York | 31 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 27 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1025 hPa. við Føroyar fer í landnyrðing. Eitt lágtrýst, 995 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið norðan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið til havið vestan fyri Føroyar verður um okkara leiðir mikudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 1/7 kl. 06[00]– 2/7. 06[00]. Hitin í gjár: 14°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í apríl: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 12 mm – mált frá 1/7 kl. 06[00]– 2/7 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 12 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

www.sosialurin.fo




## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. Juli | 01.45 | 14.16 | 00.45 | 13.16 | 01.00 | 13.31 | 03.45 | 16.16 | 04.45 | 17.16 | 00.00 | 12.31 | 11.31 | - | 02.00 | 14.31 | 03.00 | 15.31 | 01.30 | 14.01 | 02.45 | 15.16 |
| 5. Juli | 02.47 | 15.06 | 01.47 | 14.06 | 02.02 | 14.21 | 04.47 | 17.06 | 05.47 | 18.06 | 01.02 | 13.21 | 00.02 | 12.21 | 03.02 | 15.21 | 04.02 | 16.21 | 02.32 | 14.51 | 03.47 | 16.06 |
| 6. Juli | 03.25 | 15.45 | 02.25 | 14.45 | 02.40 | 15.00 | 05.25 | 17.45 | 06.25 | 18.45 | 01.40 | 14.00 | 00.40 | 13.00 | 03.40 | 16.00 | 04.40 | 17.00 | 03.10 | 15.30 | 04.25 | 16.45 |
| 7. Juli | 04.06 | 16.29 | 03.06 | 15.29 | 03.21 | 15.44 | 06.06 | 18.29 | 07.06 | 19.29 | 02.21 | 14.44 | 01.21 | 13.44 | 04.21 | 16.44 | 05.21 | 17.44 | 03.51 | 16.14 | 05.06 | 17.29 |
| 8. Juli | 04.52 | 17.19 | 03.52 | 16.19 | 04.07 | 16.34 | 06.52 | 19.19 | 07.52 | 20.19 | 03.07 | 15.34 | 02.07 | 14.34 | 05.07 | 17.34 | 06.07 | 18.34 | 04.37 | 17.04 | 05.52 | 18.19 |

5 707265 100036 >